


# Borgarstjórin við sluppmanning: Síggjast í Stavanger

Deil:

Jan Müller

20.08.2014 - 20:58

Oljan.fo

Øll hesi seinastu árini hevur tað verið siður, at føroyskar fyritøkur luttaka á stóru altjóða oljumessuni í Stavanger. Í hesum sambandi hevur sluppin Westward Ho verið partur av festivalinum á bryggjuni í oljubýnum. Og so verður eisini í ár.

Á middegi legði sluppin Westward Ho frá landi í Havn við kós móti Stavanger. Hon verður aftur í ár partur av føroysku luttøkuni á altjóða oljumessuni í Stavanger. Við sluppini eru 12 mans og skipari er Egil Simonsen.

Teir vænta at vera frammi leygardagin ella so. Stór móttøka verður umborð á sluppini, tá hon liggur við bryggju í Stavanger. Hon verður týsdagin frá kl. 17 til 19.

Annars fer at vera hugna- og veitslurómur hvørt kvøld sluppin er í norska oljuhøvuðsstaðnum. Har verður tónleikur og eisini føroyskur matur.

Tað eru Tórshavnar Kommuna og Runavíkar Kommuna, sum eru vertir til hetta afturvendandi tiltakið, sum setir sín serstaka dám á festivaløkið á bryggjuni allar stevnudagarnar.

Føroyskar fyritøkur hava so eisini egnan bás á sjálvari oljumessuni ONS.

Heðin Mortensen, borgarstjóri var á Vestaru bryggju og segði farvæl, tá Westward Ho fyrr í dag legði frá landi.

“Vit síggjast í Stavanger,” vóru fráfaringarorð borgarstjórans.








